# Sólin skein á Su



Sólin skein í gjónna við Gjógv, tá Summartónar vórðu hildnir har leygardagin 27. juni, har hesar myndir eisini eru frá. Hetta var ein av mongu væleydnaðu konsertunum hjá Summartónum, ið vóru hildnir í bæði bý og á bygd

Myndir: Rólant Waag Dam

**Sólin skein á Summartónum og sólin skein á Summartónar, sum eru av á hesum sinni. Sambært Kristiani Blak hava tey fingið ógvuliga góðar afturmeldingar, serliga til konsertir við Gjógv og úti í Mykinesi**

TÓNLEIKUR

*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Í eina góða viku ferðaðist Kristian Blak saman við tónleikarum og øðrum listafólk kring Føroyar. Tilsamans vitjaðu tey í 11 bygdum og býum – alt frá Tórshavn og Klaksvík til Mikladal og Mykines. Summartónar 2009 eydnaðist serstakliga væl – bæði tónlistarliga og eisini hvat veðrinum viðvíkur.

Talan var um innandura eins væl og uttandura konsertir, umframt at dansur og málningalist var partur av ársins Summartónum.

## Minniligar konsertir

– Tað gekk ógvuliga væl hjá okkum. Vit upplivdu áhuga allastaðni, vit vitjaðu, og tónlistarliga var tað ógvuliga spennandi og fjølbroytt, sigur Kristian Blak, fyrireikari av Summartónum.

Hann sigur, at tey hava fingið góðar afturmeldingar upp á tiltøkini.

– Serliga útikonsertinar við Gjógv og í Mykinesi hava fólk latið ótrúliga væl at, sigur hann. Kristian Blak vísur á, at útikonsertinar – ella open-air konsertirnar, sum tað eisini verður rópt – geva fólki nakað heilt annað í mun til somu konsertir, ið verða hildnar inni.

– Tað eru hesar, ið festa seg í minnið hjá fólki. Hesar konsertirnar, tá ljóð frá aldum og áum, fuglum og seyði, blíva partur tónleikinum, greiðir Kristian Blak frá. Hann vísir á, at tilvildin eisini spælir ein stóran leiklut til slíkar konsertir, tí veðrinum eru fyrireikararnir ikki harrar yvir.

– Men vit høvdu tað bakandi heitt og ikki avlýstu ikki eina konsert, teir átta dagarnar, vit vóru í gongd, sigur Kristian Blak.

## Smáplássini væl vitjað

Sambært Kristiani Blak